# Fólksins lærdi háskúli

TINGHELLAN



*Bogi Eliasen*
*cand.scient.pol*

Mangan verður tikið til, at støðið á tí føroyska almenna kjakinum er av lágt. Eg skal ikki her viðgerða, um tað er so. Heldur er ætlanin í hesi grein, at vísa á møguleikar fyri at fáa eitt betri samfelagskjak, sum sæð fram eftir, kann verða við til at lyfta politiska kjakið uppá eitt hægri støðið.

Á júst lokna fjølmiðlafestivalinum, kom m.a. fram at ov lítil munur var á søgunum í ymsu fjømiðlunum. At tær somu søgurnar ganga aftur og aftur. Hetta er helst orsaka av, at fjølmiðlarnir hava ikki fíggjarliga orku til at arbeiða burturav og djúpri við einstøkum evnum.

Okkara samfelag er so fáment, at vit mangla nakrar av náturligu funktióninum, sum samfeløgini vit samanbera okkum við hava. Um hugsað verður um samfelagskjakið, hava fjølmiðlar okkara ikki orku til at verða fjórða statsvaldið. Hvørki teir almennu ella teir privatu. Teir almennu hava tað afturat, at teir eru, í ávísum førum, ov tengdir at politisku skipanini. Hetta skal skiljast soleiðis, at teir hava brúk fyri politiskum good will. Fleirfald dømir eru um, at einstakir politikarar hótta við at skerja játtan ella inntøkumøguleikar, um teir ikki bera ynskta boðskapin fram. Tey størru bløðini Sosialurin, Dimmalætting og Fregnir hava øll trupulleika av, at tey eru ella hava verið knýtt at einari ávísari politiskari hugsjón, og tí ikki enn hava fult álit, sum óheftur tíðindastovnar í samfelagnum. Hinvegin hava vit nógv bløð í mun til fólkatalið.

Vit hava ikki eitt sterkt universitet, sum ein náttúrligan part í samfelagskjakinum, til tað er játtanin alt ov lítil. Fróðskaparsetrið er alt ov tengt av, at Løgtingið tímir at brúka pengar uppá tað, og tí skal Løgting og Landsstýrið ikki stoytast ov nógv. Fróðskaparsetrið, átti eisini at verið ein sparringspartnari hjá fjølmiðlunum, og verið ein stovnur har fjølmiðlarnir kundu leita sær ráð og vitan um ymisk viðurskifti.

### Hvussu fáa vit so eitt betri kjak - fólksins lærdi háskúli

Vit hava nógv fólk við útbúgving í Føroyum, og nógv fólk sum sita við nógvari vitan um serstøk økir. Men vit síggja ikki hesi í samfelagskjakinum. Hetta er tí, at tey eru so at siga sogin inn í samfelagið, í antin tann almenna ella privata sektorin. Her hevur verið óskrivað mannagongd, at ein ikki leggur seg út í samfelagskjakið, tí tað kann seta stovnin ella fyritøkuna í ringt ljós ella leggjast undir at stuðla einum ella hinum. Eg skilji væl, at leiðarar og stjórar eru bangnir fyri at starvfólk blanda seg í almenna kjaki, tí hetta kann skaða fyritøku ella stovn. Men, men, men…..sum sagt ger støddin á landi okkara, at fjølmiðlarnir ikki hava orkuna, til uttan víðari at verða sonevnda fjórða statsvaldi, eins og Fróðskaparsetrið ikki hevur neyðugu stødd ella fígging til at verða fult við í samfelagskjaki og menning.

Tí er tað mín meting, at vit skulu leggja okkum eftir at brúka tað tilfeingið vit hava í fólki her á landi. Vit skulu her fara eftir at finna eina føroyska loysn, tí hvørki fjølmiðlar ella Fróðskaparsetrið hava somu orku, sum í grannalondum okkara. Útlitini fyri at fjølmiðlarnir fáa størri fíggjarliga orku í nærmastu framtíð eru ikki serliga stór, eins og eingin politiskur vilji tykist at verða fyri at geva Fróðskaparsetrinum munandi størri játtan, og harvið møguleikan fyri at taka størri lut í samfelagskjakinum á seg.

Vit hava, í miðal, sera væl útbúgvið fólk og tað skulu vit brúka í einum føroyskum leisti. Vit skulu hava heimildarfólk í samfelagskjakið. Men tað krevur greiðar reglur og mannagongdir, um vit skula hava fólk at luttaka í kjakinum, sum vinna til dagliga breyð innan tað almenna ella í tí privatum fyritøkum. Serliga innan almennu fyrisitingina er neyðugt at hava greiðar reglur, fyri ikki at missa fólksins álit. Hinvegin kann luttøka frá hesum fólkum, verða við til at skapa tað gjøgnumskygni, sum nógv ynskja innan fyrisitingina. Her er neyðugt við greiðum reglum, tí tað er umráðandi, at arbeiði innan fyrisitingina og t.d. viðmerkingar í samfelagskjakinum ikki verða blandað saman. Neyðugt er at halda fast við, at viðmerkingar mugu verða breiðar samfelagsligani og ikki taka støði í einum máli, sum persónurin arbeiðir við. Ansast má somuleiðis eftir, at viðmerkingar ikki verða politisk propaganda, hvørki fyri møguliga persónliga politiska tiltrúgv, ella propaganda fyri stovnin ella avvarðandi landsstýrismann. Ein meginregla fyri tey alment settu kundi verið, at tey ikki mugu blanda seg í samfelagskjakið innan fyri tað neyva øki, tey arbeiða við. Tey mugu sjálvsagt ikki fara út málum verður við, men hinvegin má verða møguligt at koma við breiðum hugsanum um øki. Ynskiligt var, at vit høvdu oheftar serfrøðingar, sum kundu gera viðmerkingar til ítøkilig mál, teir høvdu kannað neyvt, men tað er ikki uppgávan við fólksins lærda háskúla. Um álitið á almenna sektorin skal varðveitast, má borgarin tryggjast og vita, at hann ikki sær seg aftur sum eina viðmerking í fjølmiðlunum. Her skal ein javnvág finnast og her má nevleikin víkja fyri álitinum.

Sum dømi kunna vit taka skattaviðurskifti. Ein sum arbeiðir hjá Toll- og Skatt ella í Fíggjarmálaráðnum skal kunna hugleiða um skattapolitik ella møguleikar við skattaskipanum, men ikki t.d. nú, leggja seg út í alment kjak um skattapolitikkin í samgonguskjalinum.

Ella ein í Fiskimálaráðnum eigur ikki at fara at viðgera einstøk fiskiloyvir, men kundi hugleitt um fyrimunir og vansar við fiskidagaskipanini.

Hetta eigur at verða gjørligt, og hevði betra kjakið munandi. Tað ber t.d. til hjá einum alment settum at stilla upp í politikki, og soleiðis ber tað eisini til hjá alment settum at gera samfelagsligar viðmerkingar, um viðmerkjarin sjálvur megnar at hava viðmerkingar samfelagssliga breiðar, soleiðis at neyva málsøki viðmerkjarin situr við, ikki er kjakevni og at tagnarskyldan annars verð[illegible] frá hesum heimildarfólki kunna vit fáa breiðar samfelagslýsingar, ið lærdir háskúlar annars ofta gera kring heimin. Vit skulu ikki brúka hetta fólksliga tilfeingi, til at leggja seg út í persónlig stríðsmál og partapoltisk áhugamál í almenna kjakinum, men til at fáa eitt hægri støði í samfelagskjakið.

Soleiðis er umráðandi, at vit brúka fólksins lærda háskúla, og fáa heimildarfólk í nógv størri mun at luttaka í samfelagskjakinum. Bæði fyri at fáa eitt betri og mennandi kjak, og eisini fyri kunna seta politisku skipanini størri krøv. Men her krevst eisini, at vit sleppa jantelógini og lata fólk skriva og hava ásjón um viðurskifti, uttan at viðkomandi skal spillast út. Vit mugu eisini sleppa jantelógini upp á fjall, soleiðis at vit ikki ilskast um, at fólk í almennum størvum, í størri mun siga sína hugsan um samfelagsviðurskifti. Hetta krevur tó, at vit innan tað almenna fáa greiðar reglur fyri, í hvønn mun starvsfólkini kunna luttaka í almenna samfelagskjakinum.





## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Randi M. Gunnarsdóttir og Malan Rubeksen:

# Listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík



*Malan Rubeksen og Randi M. Gunnarsdóttir hava listaframsýning í Smiðjuni frá 5. til 10. mars*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Fríggjadagin 5. mars lótu Randi M. Gunnarsdóttir og Malan Rubeksen upp listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Framsýningin er opin til og við mikudagin 10. mars**

Randi M. Gunnarsdóttir er 41 ára gomul. Hon hevur undirvíst í tekning og málning í Havn og í Kollafirði. Hon hevur eisini undirvíst í Fuglafirði í fleiri ár. Hon hevur havt fleiri framsýningar ymsastaðni í Føroyum.

Malan Rubeksen er 34 ár gomul og ættað úr Havn. Hon er útbúgvin handarbeiðslærari og hevur fingist nógv við ymiskt kreativt arbeiði. Seinastu árini hevur hon málað.

Hon byrjaði á einum skeiði hjá Randi M. Gunnarsdóttir og hevur eisini verið á skeiðnum "Myndlist"hjá Birger Møller. Hon hevur verið við á framsýning hjá Lions Club Eysturoy / Tórshavn og hevur eisini havt myndir hangandi í Glarsmiðjuni í Havn.

Randi og Malan hava havt framsýning á Lobby á Hotel Hafnia og hava nú framsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Framsýningin letur upp fríggjadagin 5. mars kl. 13.00.

Opið er fríggjadagin frá kl. 13.00 – 18.00, leygardagin frá kl. 13.00-19.00, sunnudagin frá kl. 14.00-19.00, mánadag til og við mikudag er opið frá kl. 13.00-18.00.

Føroya Postfelag:

# Sunleiv framvegis formaður

TÍÐINDASKRIV



Føroya Postfelag hevði aðalfund leygardagin 28. februar 2004.

Nógvir limir vóru á aðalfundi, har landsstýrismaðurin í postmálum, Bjarni

Djurholm var gestarøðari, og var kjakið um umlegging av postverkinum tað, sum fekk stórst rúmd.

Útmeldingarnar hjá Bjarna Djurholm vóru rættuliga positivar í samband við eina møguliga umlegging.

Starvsfólkaviðurskiftini og annað var viðgjørt, og starvsfólkinum á Frímerkjadeildini varð lovað annan bygning, um bygningurin á Argjun varð seldur.

Eftir at nevndin í Føroya Postfelag hevur skipað seg, sær hon soleiðis út.

Sunleiv Højgaard, formaður. Hendrik Thomsen, næstformaður. Ann Vilhelmsdóttir, kassameistari, Johannes A. Ellingsgaard, Jákup Páll Mohr Mortensen

Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran …**

Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.



Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann

## Gullbrúdleyp

Í dag, 6. mars, hava Hans Vilhelm og Poulina Joensen á Sandi verið gift í 50 ár.

Øll eru hjartaliga vælkomin at heilsa upp á gullbrúðarparið hjá dóttrini í Tórshavn, Vesturgøta 16, frá kl. 19.00.

## Silvurbrúdleyp

Mánadagin 8. mars hava hjúnini Elisabeth og Wenzel Guðjónsson verið gift í 25 ár.
Tey verða burturstødd.

## Prógv

23. februar hevur Sólbjørn Tausen úr Vági lokið prógv sum tyrluflogskipari. Hann varð avlærdur á Luftfartsskolen í Roskilde.

## Andlát

26. februar
Theodor S. Heinesen, Vestmanna, ættaður úr Bø
Helen Hansen, vanliga nevnd Hella, ættað úr Vági, búsitandi í Værløse, 71 ár.

27. februar
Frimann Baldvinsson, Klaksvík, 75 ár.

1. mars
Hans Oluf Johannesen, Klaksvík, 50 ár.
Bergtóra Eidesgaard, vanliga nevnd Begga, úr Vági, 53 ár.
Karl Edvard Hansen, Sandavágur, 85 ár.
Niels Djurhuus, ættaður úr Porkeri, búsitandi í Vági, 81 ár.
Marianna Johansen, Miðvágur, fødd Olsen, ættað av Válinum í Vestmanna, 89 ár.

2. mars
Jens Andreson, ættaður av Eiði, bussførari, búsitandi í Havn, 79 ár.

3. mars
Arnfinnur Helmsdal, Tórshavn, 84 ár.
Sverri Larsen, Tórshavn, ættaður úr Porkeri, 65 ár.

## Dagurin

**6. mars. Gotfred.** Óvist er, hvønn sipað verður til. Summir halda ein kardinal í Róm, deyður umleið ár 1100, aðrir ein biskup í Amiens, sum er deyður í 1115.
Týskt navn, orðini *Guð og friður* samansett.

**7. mars. Perpetua,** deyð ár 202 ella 203. Trælkona í Kartago, sum saman við hábornari konu *Felicitas* varð tikin av døgum fyri trúar sakir.

**8. mars. Beata.** Er ikki at finna í halgimannatali. Navnið merkir hin *sæla* ella *hin eydnuríka.*